FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Avloysarastarv í etnologi ella líknandi frøðigrein á Fróðskaparsetri Føroya

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í etnologi leyst at søkja. Starvið verður sett sum eitt fyribils avloysarastarv fram til 1. januar 2011. Tann, ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking og útbúgving á deildini.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Starvið ber í sær gransking, undirvísing, fyrisiting og samskifti við onnur granskingarumhvørvi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu minst hava kandidat- ella masterútbúgving í etnologi, mannfrøði ella mentanarfrøði ella eina útbúgving, sum kann javnsetast við hetta. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava granskað í føroyskum viðurskiftum.

Ein innanhýsis metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 1. februar 2010.

Starvið verður sett 1. mars 2010 ella skjótast til ber.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til fyrisitingarstjóran, Rúnu Hjelm runah@setur.fo ella til rektaran, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

Umsóknir saman við avrit av próvskjølum, CV, skrá yvir granskingarvirksemi, skrivligum og prentaðum vísindaritum skal sendast til:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag verður leygardagin 6. mars 2010 kl. 19.00 á Hotel Øravík.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Verandi og nýggir limir eru vælkomnir.

Ábit verður aftaná fundin og tí er neyðugt við tilmelding á:

Tlf: 220528 ella 212837
E-mail: so@trygging.fo ella nolaf@olivant.fo

Seinast freist at tekna seg er fríggjakvøldið 5. mars 2009 kl. 20.00

**Nevndin**

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# Starv sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni

Starvið sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni verður hervið lýst leyst til setan tann 01. mars 2010 ella skjótast eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur í starvinum at hava leiðsluna av Bókasavninum, har tú kemur at arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum sum bókasavnið.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður, men um so verður, at eingin umsøkjari er til starvið við hesi útbúgving, so kann annar umsøkjari verða settur í 1 ára tíðaravmarkað starv. Tú skal hava viðkomandi førleika í enskum máli í talu og skrift, somuleiðis sum tú skal duga væl at orða teg bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú fært møguleika fyri at menna bókasavnið.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadaginn tann 08. februar 2010 kl. 16.00.

**Nærri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 20. januar 2010*

**Fuglafjarðar býráð**



**FRENSUR burturblivin**

Mánakvøldið/týsmorgun 18.01-19.01.10. er 1 ára gamal grástríputur frensur burturblivin á abbatrøð.

**Hevur nakar sæð hann vinarliga ring 591963**

www.fjorukrogvin.fo

- *Matstova*
- *Søgusavn*
- *Gávubúð*

FJØRUKRÓGVIN Restaurant ~ Bar
*Tel. 471505 / 281505*

# Nýtir tú ov nógva olju?

Vit hava **25 ára royndir** og serkunnleika í **eftirbjálving**.

Vit blása við **leysari steinull**, ið liggur sera væl og **sjunkar ikki** sum árini ganga.

**Vit bjálva ÚTVEGGIR, INNVEGGIR, SKRÁVEGGIR, LOFT og GÓLV.**

Bjálvað verður fyrst og fremst fyri at fáa eini heitari hús og á tann hátt spara orku. Eini væl bjálvað hús hava eisini aðrar fyrimunir.

- Steinullin bjálvar sera væl móti gangi. Bæði gangi uttanífrá og gangi millum hæddir.
- Gjóstúrin í húsinum hvørvur
- Húsini gerast hugnaligari og vaksa í virði
- Húsini gerast tryggari, tí at steinullin verjir móti eldi

Øll hús kunnu bjálvast, um tey eru av timburi ella betong – nýggj ella gomul.

Íløgan er skjótt spard inn aftur í oljunýtslu.



**Ring og fá meira at vita á telefon 319309 / 519309**

**HÚSABJÁLVING**
v/ Julius Hammer ·Tel. 319309 / 519309

# Matseðil

Hósdagin 28. januar
**Rivjasteik / Grýturættur**

Fríggjadagin 29. januar
**Lasagna / Stoktur medistari / Kókað neytakjøt**

Leygardagin 30. januar
**Rullusteik**

Mánadagin 1. februar
**Fiskafrikadellur / Bollar í Karry**

Týsdagin 2. februar
**Bankikjøt / Høsnarungabringa**

Mikudagin 3. februar
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

Sosialurin
www.sosialurin.fo